# Kunningarskíggjar útboð 2019

## Innihaldsyvirlit


Inngangur ..... 2
Kravfesting ..... 2
1) Software ..... 2
2) Hardware ..... 2
Staðseting ..... 2
**Stað 1)** Høvuðsinngongd á 4. hædd ..... 3
Staðseting 1 stødd: ..... 3
**Stað 2)** Høvuðsinngongd á 4. hædd (gongin) ..... 4
Staðseting 2 stødd: ..... 4
**Stað 3)** Móttøkan á 4. Hædd ..... 5
Staðseting 3 stødd: ..... 5
**Stað 4)** Kantinan á 3. Hædd ..... 6
Staðseting 4 stødd: ..... 6
Montering ..... 6
Vitja okkum ..... 6
Samanumtikið ..... 7
Software: ..... 7
Hardware: ..... 7
Skilja Software og Hardware ..... 7
Spurningar ..... 7

## Inngangur

Á Glasi ynskja vit at betra um kunningina á skúlanum við at taka í nýtslu kunningarskíggjar. Tað hevur týdning at vit fáa stýrt skíggjunum umvegis eina sentrala loysn, og at skermarnir lúka treytirnar fyri "Digital Signage", tað er, at teir tola at standa tendraðir 24/7 uttan at myndin brennist føst, og at teir kunnu fjarstýrast.

## Kravfesting

### 1) Software

Vit ynskja eina sentrala software loysn til stýring av skermunum. Antin on-site ella í cloud.

Vit hava møguleika at hýsa hesum lokalt á einari virtuellari maskinu, so hardware til hýsing noyðist útbjóðari ikki at hugsa um. Tað ber eisini til at bjóða aðrar loysnir. Tað er tó týdningarmikið at allur kostnaðurin er nevndur.

### 2) Hardware

- Stórskíggjar við í minsta lagi 4k upployusning.
- Tola digital signage nýtslu 24/7
- Fjarstýrast
- Innbygdan avspælara

## Staðseting

Í útboðnum eru **4** ymiskar staðsetingar á Glasi. Av tí at tað er ymiskt hvussu stórar rammur skermar hava, eru krøvini ikki í tummum, men upplýst eru fysisku mátini á staðnum, soleiðis at veitarin kann bjóða tann skermin, ella teir skermar, ið tey meta eru best egnaðir.

## Stað 1) Høvuðsinngongd á 4. hædd

Við høvuðsinngongdina ynskja vit ein skerm ið er uppsettur aftanfyri glasið, sum er markera í grønum.

Tað er upplagt at hesin skermurin er loddrættur, men hetta er ikki eitt krav.



*Mynd 1- Stað 1 (Høvuðsinngongd)*




*Mynd 2 Stað 1 (Høvuðsinngongd nærmynd)*

Staðseting 1 stødd:

- Sjónlig breidd er: **96 cm** (hámarkið á skermi er **100 cm í breidd**)
- Hámarkshædd er: **260 cm**

## Stað 2) Høvuðsinngongd á 4. hædd (gongin)

Her ynskja vit ein “Digital Signage Stand”, ið er eitt loddrætt stativ við einum skermi frammanfyri og aftanfyri.




*Mynd 3 – Stað 2 (Gongin)*

Staðseting 2 stødd:

- Hámarksbreidd og longd: **98 cm**
- Hámarkshædd: **265 cm**

## Stað 3) Móttøkan á 4. Hædd

Við móttøkuna ynskja vit ein skerm. Her eru tveir møguleikar at monterað:

1. loddrætt (grøn markering)
2. vatnrætt (reyð markering).

Vit eru áhugaðir í uppskotum um bæði, men vit hella til eina loddrætta loysn.

(Hjartastartarin sum er á vegginum og borðið verða ruddað burtur.)




*Mynd 4 - Stað 3 (Móttøkan)*

### Staðseting 3 støðd:

**Støðd loddrætt:**

Hædd: **266 cm**

Longd: **156 cm**

**Støðd vatnrætt:**

Hædd: **145 cm**

Longd: **424 cm**

## Stað 4) Kantinan á 3. Hædd

Í kantinuni ynskja vit at fáa eina loysn har skermar eru monteraðir á eina súlu. Her ynskja vit at veitarin kemur við einari loysn ið gagnnýtir súluna. Tað kundi eitt nú verði fleiri skermar, soleiðis at teir síggjast frá fleiri vinklum og/ella avlangir skermar.




*Mynd 5 - Stað 4 (Kantinan)*

### Staðseting 4 støðd:

| |
|---|
| Hædd: **268 cm**<br>Ummálið er: **192 cm**<br>Diametur (ø): **61,1 cm** |

## Montering

Tað verður sæð jaligt um veitarin hevur møguleika at veita montering av skermunum.

## Vitja okkum

Vit síggja tað sum ein fyrimun um veitarin kemur á vitjan, fyri at síggja støðini, og til eitt prát um møguligar loysnir, áðrenn tilboð verður givið.

# Samanumtikið

Vit ynskja fylgjandi:

## Software:

**1x** Software loysn til at stýra og vísa tilfar.

## Hardware:

### *Stað 1:*

**1x** skerm

### *Stað 2:*

**1x** dupult skerm á stativi (Møguliga **2x** einkult skerm á stativi, um veitarin kann argumentera fyri hesum)

### *Stað 3:*

**1x** skerm

### *Stað 4:*

**2x** ella fleiri skermar (ella onnur loysn, ið veitari metur er betur egnað á súluni)

## Skilja Software og Hardware

Vit ynskja at tað er møguligt at skilja Software og Hardware í tvey ymisk tilboð, um vit meta at samlaða loysnin ikki er nøktandi. T.e. at tað ber til at taka av software loysnini frá einum veitara, og hardware frá einum øðrum. Um einki tilboð er nøktandi, tilskila vit okkum rættin til ikki taka av nøkrum tilboðið.

# Spurningar

Spurningar skulu vera skriftligir og skulu teir setast Áka H. Højsted við telduposti til ahh@glasir.fo

Freistin at seta spurningar er **3. juli 2019 kl. 12.00**. Svar vera almannakunngjørd á keypsportalinum, so skjótt tey vera svara.

Freistin at lata inn tilboð er **4. Juli 2019 kl. 12.00,** og verður fari undir samráðingar so skjótt sum møguligt. Vinnarin verður almannakunngjørdur í seinasta lagi tann **5. juli 2019**.

Glasir tilskilar sær rættin ikki at taka av nøkrum tilboðið, um mett verður at einki er nøktandi.

Øll tilboð, við tilfari, skulu sendast til ahh@glasir.fo í PDF formati, og prísurin skal vera íroknað frakt, toll og levering til Glasir.